


# Nýggj bók: 25 ár síðan oljudreymurin kveiktist

Jógvan Hugo Gardar

27.11.2014 - 11:29

Oljan.fo

Týsdagin 2. desember kemur út bókin ‘OLJAN - føroysk vinnu- og samfelagsmenning í 25 ár’. Høvundarnir eru Jan Müller og Tróndur Djurhuus. Teir hava gravað í søguni, og í bókini, sum er 550 síður til støddar, er møguligt at fylgja gongdini frá teimum fyrstu fetunum fyrst í nítiárunum til boringarnar, sum endaðu í heyst.

- Meðan frálandsvinnan fyri 25 árum síðani kendist føroyingum at kalla sum ‘science fiction’ – sum eitt slag av óveruleika – er hon í dag ein av størstu vinnum í Føroyum, hóast vit enn ikki hava funnið okkara egnu olju, sigurJan Müller, stjóri á oljan.fo og rithøvundur.

Høvundarnir greiða í bókini frá, hvussu stóran týdning yvirtøkan av føroysku undirgrundini í 1992 hevur havt fyri føroyskan hugburð, altjóðagerð, vinnumenning og samfelagsgongd annars. Bókin greiðir eisini gjølla frá teimum níggju boringunum, sum higartil eru gjørdar undir Føroyum, og viðgea harafturat spurningin um, hvat skal til fyri at fáa oljufeløgini at bora fleiri brunnar.

Bókin er ikki minni enn 550 síður við meira enn 150 myndum.

*Framløga av bókini verðurí Perluni í Tórsgøtu í Havn týsdagin 2. desember kl. 17 og á Bókasavninum við Løkin í Runavík hósdagin 4. desember kl. 17.*